


## Dimma repar seglini

Millum 6 og 10 fólk søgd úr starvi í Dimmusamtakinum. Tey eru nú 41 starvsfólk eftir umframt fimm lærlingar. - Longu tá vit keyptu Vinnuvitan og Vikublaðið var meiningin, at samansjóða bløðini og laga starvsfólkatalið til, og tað hevur so tikið okkum hesar mánaðirnar við einari summarferiu ímillum, sigur Árni Gregersen, blaðstjóri í samtakinum. Umskipanin hevur við sær, at KT-deildin, sum annars hevur verið rættiliga stór, nú verður niðurløgd og tænastan keypt uttan fyri húsið. Tað merkir, at tað ikki longur er brúk fyri teimum fýra starvsfólkunum, sum hava arbeitt á KT-deildini. Hini uppsøgdu starvsfólkini hava starvast teknisku og søludeildini, umframt, at okkurt einstakt blaðfólk er sagt úr starvi. - Nøkur hava sagt seg úr starvi eisini, so eg fái ikki sagt nærri enn, at tað eru millum 6 og 10 fólk, sum eru søgd úr starvi í dag, sigur Árni Gregersen. Tað er eingin loyna, at Dimmalætting og Dimmusamtakið hevur flotið tungt í sjónum, men við teimum umskipanum, sum nú eru farnar fram, roknar Árni Gregersen við, at tølini á botnlinjuni aftur verða svørt. Men talan verður ikki um nakra broyting í útgávunum. - Øll trý bløðini fara eisini frameftir at koma út sum vanligt, sigur Árni Gregersen, blaðstjóri.

# eru mítt nýggja heim

um frá forliptum kvinnum.

Heldur ikki Peter Lundin er nakað undantak í so máta. Eina tíðarskeiðið fekk hann so nógv brøv í Herstedvester, at starvsfólkið mátti kvotera brævarúgvuna, og umframt hetta hevur hann í seinastuni havt vitjan av í minsta lagi tveimum kvinnum hesa seinastu tíðina.

Longu meðan hann sat í fongsli í USA hevði hann fleiri elskarinnur. Ein teirra var Tine frá Målev. Hon skrivaði saman við honum, og tá hon einaferð fór til USA at vitja, hevði Peter Lundin skipað fyri brúdleypi, og longu sama dag giftust tey.

Samstundis hevði hann í minsta lagi eina aðra unnustu, sum búði hjá pápa hansara, Ole Lundin.

Men tá hon fann út av, at Peter Lundin hevði gift seg, stakk hon av.

Heldur ikki í Danmark hevur Lundin liðið nakra neyð í so máta. Heimaftur komin flutti hann inn hjá konu síni, Tinu, men tað gekk bara stutt tíð, so hevði hann funnið sær eina aðra – Marianne Pedersen. Men tað sambandið slitnaði sum kunnugt 16. juni 2000.

Seinni kom hann so í samband við føroysku Mariann Poulsen, sum hann giftist við síðst í september, men longu eftir 11 døgum vildi hon sum kunnugt skiljast aftur.

Og nú vita donsk bløð so at siga, at Peter Lundin hevur funnið sær enn eina Marianne, sum skal vera prestadóttir.

Peter Lundin endar brævið við at siga, at hann ætlar sær at búgva í føroyum, tá hann verður leyslatin, og so mugu vit bara gera upp við okkum sjálvi, hvat vit halda um tað.


KØBESEDDEL

Særlig Sikret Afd. E

Dag, den / F.Nr.

| antal | vare | pris |
|---|---|---|
| | MODTAGET I ALT: | |




*Baksíðan á brævbjálvanum er samstundis bíleggingarseðil hjá teimum fongslaðu í Statsfængsel Østjylland.*

## Brævið:

*22.10.08*

*Til Sosialurin*
*vedr: Dialog (mht. interview)*

*Jeg skriver til Sosialurin mht. at etablerer en dialog.*
*Jeg ved jo ikke hvem der er den rigtige person/journalist til at skrive til, så jeg anmoder herved at Sosialurin kontakter mig.*

*Jeg mener at jeg er blivet misforstået og derfor fortjener chancen til at forklare/forsvare mig.*
*Altså, når jeg bliver løsladt i nogle (få) åar, så kan jeg jo ikke bare komme hjem til Færøerne (når alle er i mod mig!) ...jeg elsker Færøerne og det er mit nye hjem.*

*Jeg håpber vi kan etablerer en dialog*

*MVH...*

*Bjarne Skounborg/Peter Lundin*